DAGSINS MEINING

Gott og flott Pætur

Seinastu árini hava vit oftani hoyrt, hvussu góðir ambassadørur fótbóltlandsliðið er fyri Føroyar. Hóast liðið hevur tapt nógvar av dystum sínum, verður úrslitið oftani kortini mett at vera bæði gott og flott. At pinkutjóðin Føroyar skal eiga eitt fótbóltslandslið, ið kann spæla móti teimum stóru, verður mett sum nakað serligt, nakað stórt og nakað eksotiskt.

Men tað er so sanniliga ikki bara innan fótbóltin, at vit sum tjóð og fólk hava nakað at vísa umheiminum. Eisini á øðrum økjum eiga vit fólk, sum hava evni og gávur at umboða okkum – at vera okkara ambassadørar.

Tónlistin er nakað, sum eyðkennir lond og fólk. Mætir tónleikarar hava skrivað sítt navn í søguna og hava heimlond teirra teimum nógv fyri at takka. Teir eru ambassadørar fyri sítt land langt langt út í framtíðina.

Hóast fáment so eiga vit eisini nógv góð tónlistafólk. Ein gongd, sum hevur tikið dyk á seg seinastu árini. Pætur við Keldu er einki undantak í so máta. Ikki tí – hann hevur ikki vunnið stórsigrar á palli ella fest sítt navn í altjóða tónleikasøguna. Ikki enn. Men við síni luttøku á danska Grand Prixinum hevur hann kortini laðað bæði sær sjálvum og sínum heimlandi ein varða at kunna byggja viðari á.

Vit vunnu, hóast vit taptu. Hetta hevur verið niðurlagið eftir mangar fótbóltslandsdystir. At gerast nummar fimm í danskari tónleikakapping er júst tað sama. Tað er at vinna, hóast tú "tapir". At vinna hjørtu – at vinna virðing – at slóða fyri nøkrum góðum í tónleikinum. Tað er at vinna.

Lagið hjá Pæturi var eitt listarligt avrik. Tað var fragd fyri oyrað - fyri sálina. Tað var tað besta av teim, ið vóru við í endaspurtinum. Ikki tí at tað var okkara maður, sum átti og framførdi tað. Nei, tað var tí, at tað veruliga rakti í plett. Nú er slík kapping tó meira enn bara eitt gott lag. Tað er eisini eitt show, ein dystur um bestu og mest spennandi framførsluna. So hóast tað ikki lat dyrnar upp til europeisku kappingina í Letlandi, so lat Pætur við sínum lag dyrnar upp til innastu kømurini í tónleikahjørtunum hjá mongum av teimum 2 milliónunum, ið fylgdu við. Hvussu ber tað til, at eitt so lítið land kann forstra so talentfullar tónleikarar! Pætur er bert enn eitt av okkara frægu tónlistafólkum, sum hava og fara at geva okkum so nógv. Dagsins vinnufokuseraða samfelag eiga eisini so nógv onnur virði, eitt nú tey, sum tónlistin hevur at bjóða. Hana eiga vit tí at hjúkla um og menna.

Sjálvandi eiga vit ikki at yvirmeta hetta, men vit eiga heldur ikki at undirmeta tað. Vit eiga at vera errin av, at land okkara hevur fostrað tónlistafólk sum Pætur við Keldu. Við liðina á mongum øðrum gávuríkum tónlistafólkum er hann ein týðandi partur av okkara mentan og identiteti, samleika. Nakað gott at byggja víðari á. Tillukku til føroyska tónleikaambassadørin Pætur við Keldu.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Handverksútbúgvingarnar og Tekniski Skúlin

Bjarni Djurholm,
landsstýrismaður

Lærlinga- og tøkniútbúgvingarnar eiga at húsast soleiðis, at hølisviður-skiftini skapa møguleikar, trivnað og framburð

Tørvurin á kvalifiseraði arbeiðsmegi er tengdur at búskapargongdini í samfelagnum. Serstakliga handverksvinnan kennir tørvin á skikkaðari arbeiðsmegi. Hesin parturin av vinnuni skipar lutvíst sjálvur fyri útbútbúgving og harvið neyðugu tilgongdini til fakini. Henda skipan er sjálvregulerandi, sæð í mun til útboð og eftirspurning. Tá so talið av lærupláss um er speg-ilsmynd av aktivitetinum, so má skipanin metast smidlig og skilagóð, samfelagnum at frama.

Leikluturin hjá tí almenna er tó eisini sjálvsagdur, tá um lærlinga-og tøkniútbúgving ræður. Tað almenna hevur m.a. ábyrgdina av, at høli og útbúnaðar standa mát við alsamt skiftandi menningina í handverksfakunum og innan tøkniútbúgving sum heild. Lítil ivi er um, at handverksvinnan virkar sambært umstøðunum, og at vinnan loysir tilgongdina av lærl-ing-um samsvarandi umstøðunum, tvs. á fullgóðan hátt. Spurningurin er tí, hvussu loysir tað almenna sína uppgávu?

Teknisku skúlarnir

Neyvan er nakar ivi um, at teknisku skúlarnir hava kvalifiseraðar lærarar og dagførd-an útbúnað.

Fyrst í nítiárunum, vórðu ymisku teknisku útbúgvingarnar lutaðar millum báðar tekn-isku skúlarnar. Høvuðsmunurin var, at HT endaði í Klaksvík, meðan meginparturin av lærlingaútbúgvingunum vóru lagdar í Tórshavn. Harumframt hava skúlarnir báðir onnur tilboð, t.d. SIT.

Aðalmunurin millum skúlarnar eru tó hølini. Tekniski Skúlin í Klaksvík varð um- og útbygdur í áttatiárunum, so metast má, at høliskarmarnir har eru nøktandi. Verri er statt í Tórshavn.

Her hevur skúlin húsast í leigaðum barakkum einastu 20-25 árini. Høli, sum vóru ætlað sum fyribilsloysn, til skúlin varð bygdur á Marknagili. Eisini hevur skúlin hildið til í ymiskum leigaðum hølum í býnum.

Á vegamóti

Við vaksandi tilgongdini av lærlingum í huga, saman við broyttu og alsamt øktu krøvunum til tær ymisku útbúgvingarnar, er lítil ivi vera um, at Tekniski Skúlin í Tórshavn stendur á einum vegamóti.

Skal skúlin framhaldandi vera karmurin um dygga frálæru og eisini megna at taka móti komandi avbjóðingum, serstakliga við oljuvinnuni í huga, so má skúlin nú fáa nýggj og dagførd høli.

Skipanin við læruplássum er skilagóð. Ein skipan, sum yvir áramál, skapar javnvág við arbeiðsmegi í handverksvinnuni. Sostatt frítekur vinnan tað almenna frá at fremja útbúgvingarskipan, sum verður rikin og regulerað samsvarandi politiska veðurlagnum. Nakað, sum neyvan hevði tænt handverksvinnuni og slettis ikki samfelagnum uppá sikt.

Tað er tí sjálvsagt, at lærlingaútbúgvingarnar húsast soleiðis, at hølisviðurskiftini skapa møguleikar, trivnað og framburð og ikki sum nú trupulleikar og forðingar fyri at síggja longur enn til morgindagin.

Tí má politiski myndugleikin taka sær um reiggj og á skúlaøkinum raðfesta soleiðis, at Tekniski Skúlin í Tórshavn í næstum fær møguleika at húsast nýggjum tíðarhóskandi bygningum.

Almenn ábyrgd

Er íløgukarmurin ov trongur, so eigur skúlin at sleppa út á marknaðin, og har fáa hendur á áhugaðum investorum, sum vilja leggja rygg til íløguna til nýggjar bygningar. Tað almenna kann so gera langtíðarsáttmála við íleggjararnar, soleiðis, at skúlin er almenn ogn aftaná ávíst áramál.

Handverksvinnan er týðandi partur í fjøltáttanini av føroyska búskapinum. Umframt at vera sjálvberandi, so skal vinnan hava møguleikar at menna, virka og selja dygdar-vør-ur og tænastur á føroyska marknaðinum og til útflutnings (í fríari altjóða kapping).

Tað er uppgávan hjá tí almenna at skapa røttu karmarnar, bæði innan vinnuavgjalds- skattaløggávu osfr. Tá tað ræður um fysisku karmarnar liggur eisini øll ábyrgdin hjá tí almenna. Ein ábyrgd, sum higartil ikki hevur verið nøktandi umsitin.

Tí eigur landsstýrið at taka sær um reiggj og semjast um, at byggingin av nýggjum tekn-iskum skúla í Tórshavn verður framskundað. Í 2004 fyllir Tekniski Skúlin í Tórs-havn 70 ár. Tað má tí roknast at vera hóskandi og sjálvsagt, at skúlin, nú hann rundar pensiónsaldur, fer at húsast í nýggjum, tíðarhóskandi og dagførdum hølum. Eitt stig, sum er í fullum samsvari við almenna vinnupolitikkin.

Vágatunnilin

Kári P. Højgaard,
løgtingsmaður
Sjálvstýrisfloksins

Fyrst tøkk fyri hugnaliga samveru í Miðvági, tá tunnilin varð skotin ígjognum. Tøkk til tykkum sum hava framt verkið, og tit sum hava staðið fyri arbeiðinum, tøkk øll somul.

Undir hátíðarhaldinum høvdu umboð fyri flestu flokkar orðið og tóku sær heiðurin av, at verkætlanin er um at verða verðuleiki. Ivaleyst var onkur hjástaddur, sum saknaði røddina á einum av teimum trimum umboðunum fyri Sjálvstýrisflokkin, sum eisini vóru hjástaddir hesa løtuna.

Tað er ikki neyðugt at greiða frá leiklutinum, Sjálvstýrisflokkurin hevur havt fyri Vágoynna, tað gongur sjón fyri søgn. Tað varð meðan Sjálvstýrisflokkurin átti landsstýrismannin í samferðslumálum, at Atlantsflog gjørdist veruleiki og føroyingar fingu egið flogfar og tyrlu. Hetta hendi, hóast nógvir fótonglar vórðu lagdir at forða fyri, at hesar ætlanir kundu fremjast.

Hvat við Súluni og Gásadalstunnlinum ?

Til næstseinasta fólkatingsval, hevði Sjálvstýrisflokkurin fingið mann valdan í Vágum, um hetta hevði verið eitt løgtingsval. Hetta herðaklappið fekk flokkurin frá vágafólki fyri leiklutin, at fremja verkætlanina av undirsjóvartunnlinum.

Vónandi endurtekur søgan seg til komandi løgtingsval.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Fri. kl. 15	Fri. kl. 12	Fri. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Fri. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Svar til Sannu Silvurstein

Sólvit Simonsen

Tú byrjar við at nevna mítt navn og forsetur allan vegin gjøgnum lesarabrøv títt, so ætli eg mær at gera nakrar viðmerkingar, men ikki hysteriskar, sum tú vil gera tær til, tað kunnu onnur fólk døma um hvør skriving var meira hysterisk – tín ella mín.

Tú sigur at eg blívi við at skriva, hettar er ikki satt, eg skrivaði tvey lesarabrøv um ferðaætlanina, men tey blivu bæði skrivaði í fjør, nakað annað er at fleiri hava skrivað og tikið undir við tí, sum eg skrivaði, so tað eru nógv, ið taka undir við mær, um tú er ímóti.

Víðari skrivar tú at vit bera okkum at, sum um vit eiga Gomlu rætt og Teistan. Er tú í iva, um hvat hvat ferjulegan á Gomlu rætt bleiv bygd til?

Er tú í iva um hvat Teistin bleiv bygdur til? Tá ið gjørt verður upp í pengum er tað í hvussu so er Sandoyggin sum stendur fyri skotum.

Síðani tekur tú til at tað er so stuttur teinur, bert 10 min. millum Hest og Gomlu rætt; Súlan tekur 40 ferðafólk, tí meti eg at tit áttu ikki at gjørt avslag uppá Súluna til morguntúr og um hon lá í Hesti, so kundu tit sjálvi eisini gjørt av við einum kvøldtúri, og ikki verið bundin av Sandoyarferjuni. Og so høvdu tit sjálvandi Teistan til tað tungu ferðsluna. Síðani skrivar tú um, at Teistin kemur heilt heim á Hol á Eystfallinum. Metir tú so ferðaætlanina bert á eystfallinum, ella hvussu langt er hann úr hesum vælsignaða holi á vestfallinum.

Eg komi av góðum grundum ikki at brúka hesa rutuna, men loyvi mær at koma fram við mínari meining álíkavæl. Og síðani fari eg at enda við, at tað sum Teistin siglir við fyrsta túr úr Sandoynni, er arbeiðsfólk, skúlafólk og onnur ferðafólk, og ikki tvey skúlabørn sum møguliga koma aftur til bygdar.

Somuleiðis er nógv framleiðsla frá virkjunum í Sandoynni sum skal um fjørðin, so Sandoyggin hevur sanniliga brúk fyri Teistanum.

Annars sendi eg øllum hestfólki mínar vinarligastu heilsanir.

Bræv til løgmann viðvíkjandi almenna starvsfólkapolitikkinum

Gunnleivur Dalsgarð,
formaður í
Starvsmannafelagnum

Málið um Landsverkfrøðingin – uppsøgnin av Henning Jacobsen og miseydnaða ætlaða samanleggingin við Strandferðsluna – er nú aftur komin á pallin. Løgtingsins umboðsmaður hevur givið sín lemjandi dóm í framferðini viðvíkjandi mannagongdini tá nýggjur landsverkfrøðingur varð settur og nú hevur eitt tingfólk (Katrin D. Jacobsen) reist spurningin, um at fáa alt málið endavent aftur og at umfatandi kanning verður sett verk, fyri at fáa fulla greiðu á, hvat veruliga fór fram uppundir jól í 1998 og dagarnar aftaná.

Vit fara við spenningi og áhuga at fylgja við, havt kemur burturúr hesum. Tað eigur ikki at vera fremmant fyri nøkrum, at leiklutur okkara hevur allatíðina verið rættuliga sjónligur í hesum ódámliga máli.

Men tað er ikki hesa nýggju vendina í málinum vit fara at viðgera her, men tær frágreiðingar og viðmerkingar, sum eru komnar, aftaná sera álvarsomu niðurstøðuna frá Løgtingsins umboðsmanni.

Niðurstøðan hjá umboðsmanninum er stutt og greitt, at røtt mannagongd er ikki nýtt tá fráboðan um setanina fór fram og at hetta er sera álvarsamt, staðfestir umboðsmaðurin.

Í Degi og viku mánadagin 04.02.2002 vórðu stuttar, men sera áhugaverdar viðmerkingar frá aðalstjóranum Arna Poulsen og landsstýrismanninum Bjarna Djurholm í Vinnumálastýrinum um niðurstøðuna hjá umboðsmanninum.

Aðalstjórin segði at umsitingin í Vinnumálastýrinum tók "dómin" til eftirtektar og fór at broyta mannagongdir.

Landsstýrismaðurin segði at hetta fekk ikki avleiðingar fyri umsitingina í Vinnumálastýrinum og tók hann ábyrgdina av tí, ið varð farið fram.

Men, so legði hann aftur at, at torført er at finna reglur fyri hvussu fram skuldi farast í slíkum viðurskiftum, og var her talan um bæði almenna og kommunala fyrisiting og fyrisitingina sum heild og hevði hann (Vinnumálastýrið) nú tikið stig til at broyta hetta innan hansara virkisøki og var hetta tí eisini eitt frambrot sum heild innan tað almenna, at fáa skil viðurskiftunum á almenna starvsfólkaøkinum, sum beinleiðis vóru ógreið.

Tað landsstýrimaðurin her sigur, er sera álvarsom ábreiðsla og ákæra á løgmann og umsiting hansara og kann ikki leggjast øðrvísi út, enn at hon ikki røkir tær uppgávur hon skal og at tað nú er Vinnumálastýrið, sum hevur tikið stig til at fáa hetta uppá pláss. Løgmaður umsitir eisini kommunal mál.

Vit sum í dagliga arbeiði okkara hava við starvsfólkaviðurskiftir at gera og sum allatíðina fáa at vita, at starvsfólkaviðurskiftir liggja í hondunum hjá løgmanni og umsiting hansara, eru órkymlaði og órógvaði av hesum beinleiðis ákærunum, sum landsstýrimaðurin í Vinnulmálum her setur fram móti løgmannsumsitingini, tí hvat er tað sum veruliga fer framm her: er ongin samskipan av starvsfólkaviðurskiftununum innan almenna umsiting, er tað í veruleikanum hvør stýrið ella landsstýrismaður, sum setur sínar egnu reglur fyri einum yvirornaðum starvsfólkaplotikki, er onki eftirlit við virkseminum hjá ovastu leiðuslunum í stýrunum á hesum øki ella hevur almenna umsitingin í veruleikanum ongan fast skipaðan starvsfólkapolitikk ??

Her eru, sum sagt, settar fram sera álvarsamar ábreiðslur ella beinleiðis ákærur av einum landsstýrimanni, at løgmaður og umsiting hansara ikki skipa og røkja starvsfólkapolitikkin sum hann eigur og fara vit tí at spyrja løgmann hvørjar avleiðingar hetta fær fyri hann (løgmann) og umsiting hansara og hvat hann ætlar at gera, nú tað sær út sum at landsstýrismenn í hvørjum stýrið sær, fara at taka ein slíkan álvarsaman spurning um ein fast skipaðan starvspolitikk í egnar hendur og møguliga lagað hann eftir egnu "høvdi".

Vit vænta eitt fullfíggjað og nøktandi svar frá løgmanni.

Almenn størv, er ein stuðul til øki har hesi arbeiðspláss eru

Finnleif Guttesen
Valevni hjá sambandsflokkinum í Suðuroy

Hetta kan væl ikki kallast Anti-Suðurstreymoyar-politikkur?

Vit vita øll, at miðstaðarøkið er við at spreingjast av tilflyting, tí flest øll almenn størv eru har, meðan tað er ein trupuleiki at fáa tilflytarar til útjaðaran. Tað yngra ættarliði vendur heimbygdini bakið, tí tað er einki arbeiði at koma aftur til og kanska heldur ikki nóg góðar umstøður fyri trivnaðinum yvirhøvur.

Hetta er og hevur verði gongdin í nógv harrans ár. Bygdamenning verður ídag kalla økismenning og oyggjamenning. Hendan navnabroytingin er sum at stoyta gamalt vín á nýggjar fløskur og hevur ikki skapt nakra sum helst broyting. Tað blívur bert tosa, føgur orð frá samgonguni, sum einki hald er í.

At taka avgerir um at menna útjaðarin, eisini avgerðir, sum eru illa umtóktar í miðstaðarøkinum, og møguliga kostar landskassanum pening, tað megnar verandi samgonga ikki. Tað hevur víst seg at eingin vilji er til staðar fyri at gera broytingar.

Tí er tað bert eitt at gera og tað er at velja umboð hjá sambandsflokkinum, sum búgva og virka í útjaðarinum, til komandi løgtingsval. Hesi umboð, sum búgva í økinum vilja arbeiða fyri, at útjaðarin fær meinlíkar umstøður, sum í miðstaðarøkinum.

At onnur økir í Føroyum hava tað gott unna vit teimun av fullum hjarta, men vit í Suðuroy vilja ikki góðtaka at verða eftirbátar meira.

Um menningin av útjaðarinum kemur at kosta landskassanum pening, skal landskassin sjálvsagt gjalda, men tað er ikki neyðugt at hetta verður so.

Øll almenn størv, er ein stuðul frá landinum til økini har størvini eru og við at flyta hendan almenna stuðulin út til økini, kann landið menna útjaðarin nógv meira enn tað verður gjørt í dag.

Hetta vil ikki kosta landinum nakað, tí fleiri almenn størv í útjaðarunum skal sjálvsagt minka um almennu størvini í miðstaðarøkinum.

At fara í hernað, fyri at menna útjaðarin skal og má ikki verða menilíkt bardaganum hjá Don Quixote móti vindmylnum.

T-postur:
fg800@post.olivant.fo

Varaløgmaður reikar runt í Evropa

Edmund Joensen

Í hesum døgum reikar Høgni Hoydal varaløgmaður runt um í Evropa og reypar av framúr góðum føroyskum búðskapi og sigur frá, at innan 4 ár eru Føroyar suverenur statur.

Eftir sita vit allir aðrir føroyingar, skjótt á veg niður aftur á normalt búskaparstøðið, og ikki einans tað er allur veruleikin.

Anfinn Kalsberg og Høgni Hoydal hava staði á ádda fyri, at umleið 400 netto milliónir eru tveittar burtur, sum svara til í brutto eina heila milliard í føroyska búskapinum.

Jákup Fredrik Øregaard sáli segði tað so gott, at alt sum vit hava at gjalda við kemur annaðhvørt úr sjónum ella frá Holmens kanal (ríkisveiting), sum hann tók til.

Hetta er, so sætt, sum tað var sagt. Í høvuðsheitum er tað sama galdandi í dag.

Føroyar hava seinastu árini verið valsignaðar við nógvum fiski og óvanliga høgum fiskaprísi. Haðani stavar øll tann stóra eyka intøka til føroyska samfelagið frá, sum komin er í hesum valskeiðinum. Holmens kanal (Statskassin) hevur harumframt avskriva og langfiggja føroyska skuld, og annars gjørt tað møguligt at sanera vinnulív á sjógvi og landi.

Alt reyp og geip um, at landsstýrið og takka verið teirra hegnisligigu búskaparstýring er tað bera tvatl og vrøvl. Er tað nakað, sum kan sigast um hetta landstýrið so er tað júst tað øvugta. Veruligi raksturin á fíggjarløgtingslógini er hækkaðar upp ímóti milliardini seinastu fýra árini. Hetta hevði allar aðrar staðir í heiminum verið tiki, sum tekin um ómegn hjá sitandi landsstýri.

Útflutningur

Veruleikin er eisini, at útflutningur Føroya hevur ligi um 2,5 miljardir um árið, fram til hetta landstýrið tók við. Útflutningurin hevur síðani verið óvanligur, longu í 2001 kemur samlaði útflutningurin uppí móti teimum 4 milliardunum. Hetta kemst útilukkandi av hækkandi fiskaprísum á flestu fiskasløgum og høgum prísum á alilaksi.

Toskur, hýsa og flestu botnfiskasløgini eru hækkaði í miðal við einum 10 kr/kg.

Prísurin á alifiki, laksi og sílum hækkaði uppum 30 kr/kg. Har eru penga-rnir komnir frá.

Síðan er botnurin farin úr laksa marknaðinum. Botnfiskur fellur munandi eisini. Kreppa er í rækjuflotanum svartkjaftastovnurin er hóttur o.s.f.

Alt talar fyri at Føroyar eru á veg niður á eitt meira normalt búskaparstøði aftur. Tað verður bara nógv álvarsligari at fara niður aftur nú landsstýrið hevur tveitt burtur 400 milliónir av frum-inntøkum. Nú landstýrið hevur latið veruliga raksturin á fíggjarlógini hækka útvið milliardina, samstundis sum fíggjarlóg er løgd fram sum vísur hall.

Meðan føroyingar við ferð eru á veg niður á aftur eitt meira vanligt búskaparstøði, reikar varaløgmaður runt í Evropa og reypar um framúr góðan búðskap, og boðar frá suverenum stati innan 4 ár. Er slettis ongin endi á galskapinum hjá landsstýrinum spyrja fólk?